gult cyan magenta svart



# Tað grímir á Gamla Maiarínum



*Oddfríður Marni Rasmussen ummælir leikin »Krypilin frá Inishmaan«, sum Gríma framførir á Gamla Meiarínum í Havn í hesum døgum*



*– Krypilin sjálvur er meistarliga framførdur av Hans Tórgarð. Ja, føroyingar ikki bara eiga, men skulu vera stoltir av, at vit eiga so góðar sjónleikarar, sum eru búsitandi í Føroyum, og ikki minst at hava fingið Eyðun aftur til Føroya, skrivar Oddfríður Marni Rasmussen m. a. í ummælinum*

**Pallurin**

Týskvøldið var eg á sjónleikinum „Krypilin frá Inishmaan“, sum varð sýndur á Gamla Maiarínum. Leikurin er skrivaður av írska sjónleikahøvundanum, Martin McDonagh og umsettur av Hans Tórgarð og Eyðuni Johannesen, sum eisini hevur leikstjórnað og gjørt pallmyndina.

Tað er altíð løgi at koma inn á ein sjónleik. Fólk teska, sum sótu tey í eini kirkju og bíðaðu eftir, at prestur kemur inn at siga teimum, hvussu tey skulu føra seg fram.

Innkomin í sýningarhølið var ein rámur luktur av gomlum viði og góður írskur fólkatónleikur ljómaði úr hátalarunum.

Gríma hevur fingið klædningin av Tinghúsinum, sum tey hava smíðað pallin av. Hetta gjørdi, at mann nærum bleiv tveittur aftur til ta tíðina, tá leikurin fór fram. Pallurin var einkul og funktionellur. Eitt nú kundi baksíðan leggjast niður, so at eitt annað rúm stakk seg upp til leikararnar uttan at órógva restina av pallinum.

**Krypilin frá Inishmaan**

Ja, hvat handlar hesin leikurin um? Fyrst verður ein mynd lýst av fólkunum, sum búgva á hesi lítlu írsku oyggini, sum er ein av trimum oyggjum við Írland. Vit fáa at vita um eitt sleygivætti, spælt av Ega Dam og hansara fordruknu 90 ára gomlu mammu, spæld av Adelborg Linklett. Ein einkjumann, spældur av Páll Danielsen. Tvær mostrar hjá kryplinum, spældar av Biritu Mohr og Riu Tórgarð. Læknan, spældur av Jógvan Salamon Joensen. Systkini Bartley og Helen, spæld av Halli Hjalgrímssyni og Kristinu Hansen og seinast men so sanniliga ikki minst, krypilin sjálvur, meistarliga framførdur av Hans Tórgarð. Ja, føroyingar ikki bara eiga, men skulu vera stoltir av, at vit eiga so góðar sjónleikarar, sum eru búsitandi í Føroyum, og ikki minst at hava fingið Eyðun aftur til Føroya.

Ná! Øll hesi verða presenterað sum tað, tey eru. So kemur eitt filmslið úr Hollywood til eina grannaoyggj at gera ein film. Einkjumaðurin siglir Helen, Bartley og krypilin at vera við í filminum, men krypilin kemur ikki við heimaftur. Hann er farin til Amerika at royna eydnuna sum sjónleikari.

Heima gongur alt sína gongd. Tann eina mosturin er farin at snakka við ein stein og hin at eta bomm av longsli. Broytingin er sjónlig á oynni. Men so kemur krypilin aftur, onki hevur hann fingið burturúr amerikatúrinum. Heima fær hann at vita, hvussu mamma og pápi hansara doyðu eftir, at hetta hevur verið tagt alt hansara lív. Veikur av tuberklum og sinnistrupulleikum ger hann av at gera av við seg, men umbestemmar seg, tá ið Helen, sum er heldur leys upp á tráðin, lovar at ganga túrar saman við honum. Nøkurlunda soleiðis er søgugongdin.

**Samanbering**

Alt verður sett í samband við lítla Føroyar. Tað kann Krypilin frá Inishmaan eisini. Vit hava júst havt eitt filmslið í Føroyum, har meginparturin av kallkynunum við sámiligum skeggvøkstri gekk sum vóru teir strandaðir á eini oynnari oyggj. Eisini hvussu lívið er í einum lítlum oyggjasamfelag, har slatur, drykkiskapur og øvund er í hásæti. Vit kunnu í nógvar mátar samanbera okkara sinnalag við tað sinnalagið, sum verður víst fram í leikinum; sarkastiskt og ironiskt. Men tað er ikki tað, sum er áhugavert við leikinum, men er helst tað, sum hálar fólk frá sjónvarpinum og á sjónleik. Onkuntíð skulu vit standa á odda fyri onkrum og ikki bara identifisera okkum við onnur. Tað sum er áhugavert við leikinum er handritið. Tað stendur í skránni, at Martin McDonagh ikki hyggur eftir sjónleiki, men er mest áhugagur í filmslistini. Hansara stóri íblástur eru Martin Scorsese og Quentin Tarantino. Tarantino sæst aftur, kanska mest í dialogunum og hvussu nógvar tómar samrøður knappliga gerast alt avgerandi, hvussu leikur ferð fram. Serliga Bartley kundi verið ein figurur í Pulp Fiction. Hansara endurtøkur um bomm og egg líkjast líkjast endurtøkunum í filmunum hjá Tarantino. Tað sum eyðkennir hetta slag av dialogi er, at hann ikki kemur úr stað, fyrr enn onkur annar blandar seg uppí. Men Scorsese var ikki so sjónligur sum Tarantino.

Í skránni verður nógv gjørt burtur úr at vísa á ein ávísan Robert Flaherty, sum gjørdi ein Oscarvirðisløntan film í 1934, sum eitur „Man of Aran“. Filmurin verður eisini brúktur í leikinum. Og tann parturin av leikinum er helst tann mest Tarantinski, har leikarar kjakast á besta Tarantinska máta, samstundis sum filmurin verður sýndur (kann eisini samanberast við David Lynch). Senan, sum verður víst og komenterað fleiri ferðir av leikarunum, er, tá í menn av oynni eru farnir eftir einum hávi/brugdu, og eftir drúgvan bardaga fáa bilbukt við hesum beistinum (sum í leikinum hevur etið mannin hjá teirri fordruknu mammuni).

**Vælkomin heim**

Sigast má, at tað er sjónligt at síggja, at Eyðun Johannessen er afturkomin. Leikurin varð framførdur á sera høgum støði uttan mun til, at tríggir leikarar vóru áhugaleikarar. Uttan at gera mun á hesum leikarum, so vil eg draga fram Adelborg Linklett. Ótrúlig styrki, sum hon fekk fram í tí karakterinum, sum hon spældi.

Tað, at leikararnir snakkaðu gjøgnumført norðanmál gjørdi, at tú líkasum sat eftir við tankanum, at alt varð gjørt fyri at leikurin skuldi vera ein heild - so onki varð latið upp í hendurnar á tilvildini. Og tilvild er eitt orð, sum ikki átti at verði brúkt í hesum sambandi.

Eg vil við hesum fáu orðum takka Grímu fyri eitt gott upplivilsi. Nærum tað einasta, sum var at fílast at, vóru stólarnir. Mann var nærum krypladur, tá ið leikurin var liðugur.

Oddfríður Marni Rasmussen









**Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:**
**www.sosialurin.fo**

# Lokaluppgerðir á Hálsi

*Fleiri stórdystir standa á skránni um vikuskiftið, og millum annað verða fyrstu dystirnir í slagnum um Havnina leiktir. Eisini verða oddadystir í Klaksvík og á Skála*



JÁKUP MØRK

Eftir at hondbóltskappingin er byrjað heldur varliga við nøkrum bleytum dystum (undantikið tann í Klaksvík millum Stjørnuna og VB), verður av álvara lagt til brots hetta vikuskiftið.

**Heldur Stjørnan tørn**

Hjá kvinnunum eru tríggir dystir á skránni, og størsti áhugin man helst vera um teir báðar, sum skulu leikast sunnudagin.

Ein dystur varð tó leiktur í gjár, eftir at blaðið fór til prentingar, so úrslitið kenna vit ikki. Talan var um tvey lið, sum í hvør sínum lag skuldu stríðast fyri at fáa fyrstu stigini til hóldar. Nevnliga uppflytararnar úr Sóljuni, sum á heimavølli tóku ímóti Tjaldrinum. Ein dystur, har Sóljan á pappírinum mundi metast sum favorittur.

Sunnudagin verður toppdystur í Klaksvík, tá verandi føroyameistararnir úr Klaksvík taka ímóti VÍF. Í grundspælinum í fjør vann VÍF annars óvæntað hendan dystin, og eftir sannførandi avrikið móti Kyndli seinasta vikuskifti, er ikki óhugsandi, at tær aftur í ár gera tað sama. Til tess krevst tó eitt stórt tak, tí Stjørnan tykist á pappírinum als ikki at vera viknað í mun til undanfarna ár.

Tað eru hinvegin bæði Kyndil og Neistin, sum bresta saman uppi á Hálsi í fyrru grannauppgerðini í grundspælinum.

Bæði liðini hava mist týðandi leikarar frá í fjør, og

*Einki er at ivast í, at Kyndil nú ætlar at hevna seg, eftir at Neistin hevur vunnið fimm teir seinastu dystirnar millum feløgini*

spurningurin er so, hvat av liðunum í størri mun er komið seg eftir missin av hesum.

Júst uppgerðirnar móti Neistanum vóru annars sera dýrar hjá Kyndli í fjør, og tey trý tapini, sum hesar innibóru, vóru í stóran mun viðvirkandi til, at Kyndil varð sett uttanfyri gullstríðið nakað væl áðrenn kappingin endaði.

**Rimmar dystir**

Hjá monnunum eru tveir dystir á skránni hetta vikuskiftið, og einki er at ivast í, at fitt av fólki fer at savnast til hesar.

Á Hálsi verður eins og hjá kvinnunum talan um lokaluppgerð, tá mansliðini hjá Kyndli og Neistanum tørna saman.

Árið í fjør var søguligt hjá Neistanum, skilt soleiðis, at teir fyri fyrstu ferð vunnu allar grannauppgerðirnar móti teimum grønu, og hetta er ivaleyst nakað, sum kyndilsmenn vilja vaska av sær. Í roynd og veru hevur Neistin vunnið fimm tær seinastu uppgerðirnar, tí á vári 1999 vunnu teir eisini seinna dystin í endaspælinum móti Kyndli, og spældu harvið trumfin í FM-stríðnum inn á Skála.

Hin dysturin verður millum tey bæði liðini, sum mong meta sum heitastu gullkandidatarnar hetta kappingarárið. Vestmenningar fara inn á Skála, og frammanundan líkist hetta einum sera spennandi dysti. Soleiðis hevur skilið í øllum førum verið tær seinastu ferðirnar hesi lið eru brostin saman.

Bæði liðini hava undan kappingini styrkt seg, og á pappírinum tykjast vestmenningar kanska at vera tað pettið betri, sum kann tryggja teimum sigurin. Ikki minst verður spennandi at síggja, hvørt Sveinbjørn Poulsen nú fer at tørna út móti felagnum, sum hann higartil hevur umboðað øll honbóltsárini.

## Støðan undan vikuskiftinum

### 1. deild, kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 2 | 2 - 0 - 0 | 58 | 49 | 9 | 4 |
| 2 | VB | 2 | 1 - 0 - 1 | 62 | 39 | 23 | 2 |
| 3 | VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 27 | 16 | 11 | 2 |
| 4 | Neistin | 1 | 1 - 0 - 0 | 23 | 22 | 1 | 2 |
| 5 | Sóljan | 2 | 0 - 0 - 2 | 48 | 53 | -5 | 0 |
| 6 | Kyndil | 1 | 0 - 0 - 1 | 16 | 27 | -11 | 0 |
| 7 | Tjaldur | 1 | 0 - 0 - 1 | 11 | 39 | -28 | 0 |

### 1. deild, menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 2 | 2 - 0 - 0 | 81 | 42 | 39 | 4 |
| 2 | VÍF | 2 | 2 - 0 - 0 | 62 | 52 | 10 | 4 |
| 3 | Kyndil | 2 | 1 - 0 - 1 | 65 | 57 | 8 | 2 |
| 4 | Neistin | 1 | 1 - 0 - 0 | 30 | 22 | 8 | 2 |
| 5 | H71 | 2 | 1 - 0 - 1 | 59 | 60 | -1 | 2 |
| 6 | KÍF | 2 | 0 - 0 - 2 | 43 | 58 | -15 | 0 |
| 7 | Tjaldur | 3 | 0 - 0 - 3 | 67 | 116 | -49 | 0 |

# Flogbólturin í gongd

*Um vikuskiftið fer flogbóltarið av álvara ígongd, og nógv bendir á, at vit í ár fáa eina meira spennandi kapping enn í fjør*

JÁKUP MØRK

Eftir at Fleyr fyri viku síðani tjóvstartaði árið við FK-kappingini, har fyrstu finaluluttakararnir til steypakappingina vórðu funnir, fer flogbóltsárið av álvara ígongd hetta vikuskiftið.

Landskappingin stendur fyri durum, og fimm dystir skulu avgreiðast fyrsta vikuskiftið.

At talan bert er um fimm dystir kemst av, at meistaradeildin hjá monnum bert telur fimm lið í ár. Í fjør hevði Fleyr tvey lið við í kappingini, men miðskeiðis á árinum trektu teir annað liðið út. Eingin uppflytari var heludr, og tí verður kappingin nakað skerd. Spell fyri flogbóltin, men hóast alt betri, enn um sama fyribrigdi við frámelding hevði tikið seg upp aftur í vetur.

**Dráttur ger um seg**

Longu í FK-kappingini, sum altso var undanfarna vikuskifti, kom okkurt tekin um, at kappingin í ár fer at gerast meira jøvn, enn hon var í fjør.

Dráttur vann nevnliga kappingina, eftir at tær í finaluni høvdu bast Mjølnir, sum annars var fullkomuliga einaráðandi í fjør.

Dráttur verður annað av liðunum, sum leygardagin skal í eldin, tá tær á heimavølli taka ímóti Fleyr. Spennandi verður at síggja, hvussu Fleyr fer at standa seg í vetur, eftir at kappingarárið í fjør man teljast millum tey lakastu yvirhøvur hjá sigursvanda høvuðsstaðarfelagnum.

Mjølnir fer undir fyrsta stig av FM-verjuni, tá tær leygardagin fara á Kambsdal at spæla móti ÍF. Alt talar fyri einum greiðum útisigri her, men hinvegin sýndi ÍF í fleiri førum góðar taktir í fjør, tó at tær aloftast gjørdust ov stuttar til fáa nakað stig burturúr.

Seinasti dysturin hetta vikuskiftið hjá kvinnunum verður í Trongisvági, har TB skal royna seg móti uppflytarunum av Fossanesi. TB hevði í fjør eitt sera gott lið, og vóru tær millum annað einasta liðið, sum megnaði at basa klaksvíksgentunum. Megna tær at byggja víðari á góðu avrikini, er einki at ivast í, at tær eisini kunnu gera seg galdandi í toppinum, og fyrsta stigið eigur at verða tikið við einum sigri á Fossanesi.

**Trupult hjá Fleyr**

Skerda kappingin hjá monnum býður upp á tveir dystir um vikuskiftið, og verða báðir hesir leiktir leygardagin.

Á Kambsdali verður eins og hjá kvinnunum dystur millum ÍF og Mjølnir, og her má Mjølnir metast sum greiður favorittur. Steypavinnararnir frá í fjør hava longu tryggjað sær sess í steypafinaluni, og hetta borgar í øllum førum fyri, at góðskan ikki er versnað síðani í fjør.

Hin dysturin verður á Giljanesi, har SÍ skal royna seg móti føroyameistarunum úr Fleyr. Fleyr hevur, sum vera man, eitt av sterkastu liðunum í kappingini, men móti sørvingum skulu teir neyvan taka nakað fyir givið. SÍ leikti í fjør nevnliga fleiri sera góðar og undirhaldandi dystir, og vána endastøðan komst einamest av, at avrik teirra vóru alt ov óstøðug.

Verður hetta broytt í ár, kann væl hugsast, at teirra leiklutur fer at verða nógv størri hetta kappingarárið.